**Løgtingið**
Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2025-2 (Heystumfarið)

**Uppskot**
**til**
**eykajáttanarløgtingslóg**
**fyri september 2025-2**
(Heystumfarið)

Fíggjarmálaráðið

# Høvuðsyvirlit

| Høvuðsyvirlit | | | | 2025 |
|---|---|---|---|---|
| | | Rakstraræltan | | Løguætlan |
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur |
| **§ 3.** | **Fíggjarmál** | **18.900** | **8.600** | **0** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *300* | *-* | *2.000* |
| | *15. Fíggjarmál o.a.* | *-* | *-* | *-2.000* |
| | *22. Íbúðarmál* | *18.600* | *8.600* | *-* |
| **§ 5.** | **Fiskivinnu- og samferðslumál** | **650** | **-** | **-1.000** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *-* | *-* | *-1.000* |
| | *34. Fiskivinna* | *650* | *-* | *-* |
| **§ 6.** | **Uttanríkis- og vinnumál** | **2.140** | **-** | **-** |
| | *37. Handil og vinna annars* | *2.140* | *-* | *-* |
| **§ 7.** | **Barna- og útbúgvingarmál** | **6.923** | **-562** | **-8.877** |
| | *21. Almannamál* | *-3.277* | *-562* | *-* |
| | *23. Útbúgving og gransking* | *10.200* | *-* | *-8.877* |
| **§ 11.** | **Heilsumál** | **-15.200** | **-** | **4.500** |
| | *20. Heilsumál* | *-15.200* | *-* | *4.500* |
| **§ 12.** | **Almanna- og mentamál** | **3.275** | **3.500** | **-1.000** |
| | *21. Almannamál* | *3.275* | *3.500* | *-1.000* |
| **§ 14.** | **Lógarmál** | **850** | **-** | **-** |
| | *14. Lógarmál* | *850* | *-* | *-* |
| | **Tilsamans** | **17.538** | **11.538** | **-6.377** |
| Tilsamans | | 17.538 | 11.538 | -6.377 |
| Yvirskot | | - | -6.000 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ I** | | **-** | **377** | **-** |
| § 52. | 15. Fíggjarmál o.a. | 715.500 | 715.500 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ II** | | **-** | **377** | **-** |

# Tekstur

# § 3 Fíggjarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 10.300 | 18.900 | 8.600 |
| Løguætlan | 0 | 0 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **2.300** | **-** |
| 3.11.1. Fyrisiting | | 2.300 | - |
| **Fíggjarmál o.a.** | | **-2.000** | **-** |
| 3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m. | | -2.000 | - |
| **Íbúðarmál** | | **18.600** | **8.600** |
| 3.22.4. Útgjaldsskipanir | | 18.600 | 8.600 |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **3.11.1.** | **Fyrisiting** | | | |
| 36. | Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarj.) | J | 450 | - |
| | | **EYJ** | **300** | **-** |
| 61. | Talgildu Føroyar (Løguj.) | J | 12.000 | 2.000 |
| | | **EYJ** | **2.000** | **-** |
| **3.15.1.** | **Fíggjarfyrisiting v.m.** | | | |
| 12. | Nýggj skattaskipan (Løguj.) | J | 25.900 | - |
| | | **EYJ** | **-2.000** | **-** |
| **3.22.4.** | **Útgjaldsskipanir** | | | |
| 01. | Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin j.) | J | 130.100 | 57.600 |
| | | **EYJ** | **18.600** | **8.600** |

# § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 650 | 650 | - |
| Løguætlan | -1.000 | - | 1.000 |
| **Felagsútreiðslur** | | **-** | **1.000** |
| 5.11.1. Fyrisiting | | - | 1.000 |
| **Fiskivinna** | | **650** | **-** |
| 5.34.3. Gransking og menning | | 650 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **5.11.1.** | **Fyrisiting** | | | |
| 47. | Søla av landsins ognum (Løguj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **-** | **1.000** |
| **5.34.3.** | **Gransking og menning** | | | |
| 01. | Havstovan (Rakstrarj.) | J | 21.191 | - |
| | | **EYJ** | **650** | **-** |

# § 6 Uttanríkis- og vinnumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 2.140 | 2.140 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **2.140** | **-** |
| 6.37.2. Ymiskur studningur | | 1.800 | - |
| 6.37.5. Almennir karmar | | 340 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **6.37.2.** | **Ymiskur studningur** | | | |
| 04. | Endurgjald til skipasmíð (Stuðulsj.) | J | 4.000 | - |
| | | **EYJ** | **1.800** | **-** |
| **6.37.5.** | **Almennir karmar** | | | |
| 04. | Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarj.) | J | 22.598 | - |
| | | **EYJ** | **340** | **-** |

# § 7 Barna- og útbúgvingarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 7.485 | 6.923 | -562 |
| Løguætlan | -8.877 | -5.877 | 3.000 |
| **Almannamál** | | **-3.277** | **-562** |
| 7.21.3. Barnastuðul | | -3.277 | -562 |
| **Útbúgving og gransking** | | **4.323** | **3.000** |
| 7.23.2. Fólkaskúlin v.m. | | 2.900 | - |
| 7.23.5. Fólkaupplýsing | | 7.300 | - |
| 7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking | | -5.877 | 3.000 |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **7.21.3.** | **Barnastuðul** | | | |
| 01. | Barnavernd (Lógarbundin j.) | J | 8.377 | 1.612 |
| | | **EYJ** | **-1.577** | **-562** |
| 14. | Barnaverndarstovnar (Rakstrarj.) | J | 56.811 | - |
| | | **EYJ** | **-1.700** | **-** |
| **7.23.2.** | **Fólkaskúlin v.m.** | | | |
| 02. | Sernám (Rakstrarj.) | J | 48.293 | - |
| | | **EYJ** | **2.300** | **-** |
| 06. | Skúlatilboð til ung við breki (Rásin) (Rakstrarj.) | J | 6.124 | - |
| | | **EYJ** | **600** | **-** |
| **7.23.5.** | **Fólkaupplýsing** | | | |
| 02. | Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul (Stuðulsj.) | J | 350 | - |
| | | **EYJ** | **7.300** | **-** |
| **7.23.6.** | **Hægri útbúgvingar og gransking** | | | |
| 15. | Fróðskaparsetur Føroya (Løguj.) | J | 45.000 | - |
| | | **EYJ** | **-7.300** | **-** |
| 18. | Avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu (Løguj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **1.423** | **3.000** |

## C. Áteknindar

**Nr. 1. Høvuðskonta 7.23.5.02. Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul (Stuðulsjáttan)**
Landsstýrismanninum verður heimilað at samráðast við Bústaðir um treytir í leigusáttmála um næmingaheimið, undir hesum hvussu løgustuðul upp á í mesta lagi 7,3 mió. kr. kann verða latin.

**Nr. 2. Høvuðskonta 7.23.6.18. Avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu (Løgujáttan)**
Heimilað verður landsstýrismanninum at fremja avtalu við Tórshavnar kommunu um avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu.

# § 11 Heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -15.200 | -15.200 | - |
| Løguætlan | 4.500 | 4.500 | - |
| **Heilsumál** | | **-10.700** | **-** |
| 11.20.2. Heilsutænastur | | -5.700 | - |
| 11.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m. | | -5.000 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.2.** | **Heilsutænastur** | | | |
| 02. | Heilsutrygd (Rakstrarj.) | J | 12.325 | - |
| | | **EYJ** | **800** | **-** |
| 03. | Heilsutrygdarveitingar (Rakstrarj.) | J | 297.720 | - |
| | | **EYJ** | **-9.500** | **-** |
| 04. | Kommunulæknaskipanin (Rakstrarj.) | J | 18.384 | - |
| | | **EYJ** | **-1.500** | **-** |
| 09. | Apoteksverkið (Løguj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **4.500** | **-** |
| **11.20.3.** | **Sjúkrahúsverkið v.m.** | | | |
| 04. | Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | J | 1.011.843 | - |
| | | **EYJ** | **-2.000** | **-** |
| 19. | Serstakur sjúkrahúsheilivágur (Rakstrarj.) | J | 70.460 | - |
| | | **EYJ** | **-3.000** | **-** |

## C. Átekningar

**Nr. 3. Høvuðskonta 11.20.2.09. Apoteksverkið (Løgujáttan)**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at halda útreiðslur fyri 13,3 mió. kr. til umvæling av Suðuroyar Apoteki á Tvøroyri og at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

# § 12 Almanna- og mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -225 | 3.275 | 3.500 |
| Løguætlan | -1.000 | -1.000 | - |
| **Almannamál** | | **2.275** | **3.500** |
| 12.21.1. Fyrisiting | | 1.550 | - |
| 12.21.3. Barnastuðul | | -650 | - |
| 12.21.4. Sjúkradagpeningur | | 900 | 3.500 |
| 12.21.6. Eldri og serforsorg | | 7.855 | - |
| 12.21.7. Sosialar skipanir | | -580 | - |
| 12.21.8. Sosialar pensjónir | | -6.800 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **12.21.1.** | **Fyrisiting** | | | |
| 02. | Almannaverkið (Rakstrarj.) | J | 75.459 | - |
| | | **EYJ** | **2.000** | **-** |
| 11. | Brekumboðið (Rakstrarj.) | J | 1.000 | - |
| | | **EYJ** | **-450** | **-** |
| **12.21.3.** | **Barnastuðul** | | | |
| 04. | Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarbundin j.) | J | -409 | - |
| | | **EYJ** | **-200** | **-** |
| 06. | Barnaískoyti (Lógarbundin j.) | J | 14.360 | - |
| | | **EYJ** | **350** | **-** |
| 09. | Familjuískoyti (Lógarbundin j.) | J | 12.310 | - |
| | | **EYJ** | **-800** | **-** |
| **12.21.4.** | **Sjúkradagpeningur** | | | |
| 01. | Dagpeningaskipanin (Lógarbundin j.) | J | 100.383 | 16.531 |
| | | **EYJ** | **900** | **3.500** |
| **12.21.6.** | **Eldri og serforsorg** | | | |
| 02. | Bústovnar o.a. (Løguj.) | J | 24.250 | - |
| | | **EYJ** | **-1.000** | **-** |
| 09. | Trivnaðartænastur (Rakstrarj.) | J | 496.777 | - |
| | | **EYJ** | **555** | **-** |
| 25. | Bústovnar, løgustuðul (Stuðulsj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **8.300** | **-** |
| **12.21.7.** | **Sosialar skipanir** | | | |
| 01. | Almannatrygd (Lógarbundin j.) | J | 147.240 | 424 |
| | | **EYJ** | **-580** | **-** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **12.21.8.** | **Sosialar pensjónir** | | | |
| 01. | Fólkapensjón (Lógarbundin j.) | J | 735.837 | - |
| | | **EYJ** | **-7.000** | **-** |
| 05. | Fyritíðarpensjón (Lógarbundin j.) | J | 350.469 | - |
| | | **EYJ** | **-300** | **-** |
| 13. | Viðbót til ávísar pensjónistar (Lógarbundin j.) | J | 33.271 | - |
| | | **EYJ** | **500** | **-** |

# C. Átekningar

**Nr. 4. Høvuðskonta 12.21.6.25. Bústovnar, løgustuðul (Stuðulsjáttan)**
Landsstýrismanninum verður heimilað at samráðast við Bústaðir um treytir í leigusáttmála um tveir íbúðabygningar, sum Almannaverkið leigar, undir hesum hvussu løgustuðul upp á í mesta lagi 8,3 mió. kr. kann verða latin.

# § 14 Lógarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 850 | 850 | - |
| **Lógarmál** | | **850** | **-** |
| 14.14.1. Ymsar útreiðslur | | 850 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **14.14.1.** | **Ymsar útreiðslur** | | | |
| 10. | Útlendingastovan (Rakstrarj.) | J | 10.138 | - |
| | | **EYJ** | **850** | **-** |

# § 52 Serinntøkur, løgmansfyrisitingin

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 0 | 715.500 | 715.500 |
| **Fíggjarmál o.a.** | | **715.500** | **715.500** |
| 52.15.5. Útlán | | 715.500 | 715.500 |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **52.15.5.** | **Útlán** | | | |
| 04. | Yvirtøka av Íleggingargrunninum (Stuðulsj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **715.500** | **715.500** |

# Almennar viðmerkingar

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum leggur við hesum fram uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri Løgtingið. Samanumtikið gevur hetta eykajáttanaruppskotið eitt samanlagt yvirskot á 0,4 mió. kr. (RLÚ 1).

Talan er um, at játtanir á rakstrarsíðuni lækka við netto 9,6 mió. kr. Á løgusíðuni lækka løgujáttanir við netto 6,4 mió. kr. og løgukendar játtanir hækka við 15,6 mió. kr.

Yvirtøkan av Íleggingargrunninum er tikin við á tann hátt, at eginognin er tikin við sum inntøka, men síðani sum útreiðsla flutt grunninum sum eginogn. Hetta er útreiðsluneutral serinntøka, sum partur av RLÚ 2.

Fyri tær eykajáttanir sum eru av varandi slagi, verður lagt upp fyri hesum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2025.

Verður hugt nærri at hvørjum øki sær, fevnir eykajáttanaruppskotið um fylgjandi:

Á § 3 Fíggjarmál verður biðið um 10,3 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Sáttmálaviðurskifti verður hækkað við 300 tús. kr., at løgujáttanin til Talgildu Føroyar verður hækkað við 2 mió. kr., at løgujáttanin til Nýggja skattaskipan verður lækkað við 2 mió. kr., og at játtanin til Stuðul til rentuútreiðslur verðiur hækkað við netto 10 mió. kr.

Á § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál verður biðið um -0,4 mió. kr. Biðið verður um, at nýggj løgujáttan til Søla av landsins ognum verður -1 mió. kr., og at játtanin til Havstovuna verður hækkað við 650 tús. kr.

Á § 6 Uttanríkis-og vinnumál verður biðið um 2,1 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Endurgjald til skipasmíð verður hækkað við 1,8 mió. kr., og at játtanin til Heilsufrøðiligu starvsstovuna verður hækkað við 340 tús. kr.

Á § 7 Barna-og útbúgvingarmál verður biðið um -1,4 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Barnavernd verður lækkað við netto 1.015 tús. kr., at játtanin til Barnaverndarstovnar verður lækkað við 1,7 mió. kr., at játtanin til Sernám verður hækkað við 2,3 mió. kr., at játtanin til Skúlatilboð til ung við breki verður hækkað við 600 tús. kr. Eisini verður biðið um, at løgustuðulsjáttanin til Ítróttaháskúlan í Vági verður hækkað við 7,3 mió. kr. og átekning verður tikin við, at løgujáttanin til Fróðskaparsetur Føroya verður lækkað við 7,3 mió. kr., og at løgujáttanin til Avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu verður netto -1.677 tús. kr. og átekning verður tikin við.

Á § 11 Heilsumál verður biðið um -10,7 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Heilsutrygd verður hækkað við 800 tús. kr., at játtanin til Heilsutrygdarveitingar verður lækkað við 9,5 mió. kr., og at játtanin til Kommunulæknaskipanina verður lækkað við 1,5 mió. kr. Eisini verður biðið um, at løgujáttanin til Apoteksverkið verður 4,5 mió. kr., at játtanin til Landssjúkrahúsið verður lækkað við 2 mió. kr., og at játtanin til Serstakan sjúkrahúsheilivág verður lækkað við 3 mió. kr.

Á § 12 Almanna- og mentamál verður biðið um -1,2 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Almannaverkið verður hækkað við 2 mió. kr., at játtanin til Brekumboðið lækkar við 450 tús. kr., at játtanin til Barnapening veittan í forskoti verður lækkað við 200 tús. kr., at játtanin til Barnaískoyti verður hækkað við 350 tús. kr., og at játtanin til Familjuískoyti verður lækkað við 800 tús. kr. Eisini verður biðið um, at játtanin til Dagpeningaskipanina verður lækkað við netto 2,6 mió. kr., at løgujáttanin til Bústovnar verður lækkað við 1 mió. kr. og átekning verður tikin við, at játtanin til Trivnaðartænastur verður hækkað við 555 tús. kr., at løgustuðulsjáttanin til Bústovnar verður 8,3 mió. kr. og átekning verður tikin við. Herumframt verður biðið um, at játtanin til Almannatrygd verður lækkað við 580 tús. kr., at játtanin til Fólkapensjón verður lækkað við 7 mió. kr., at játtanin til Fyritíðarpensjón verður lækkað við 300 tús. kr., og at játtanin til Viðbót til ávísar pensjónistar verður hækkað við 500 tús. kr.

Á § 14 Lógarmál verður biðið um 0,9 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Útlendingastovuna verður hækkað við 850 tús. kr.

Á § 52 Serinntøkur, løgmansfyrisitingin er umbønin útreiðsluneutral. Játtanin til Yvirtøku av Íleggingargrunninum er tikin inn við inntøku og útreiðslu á 715,5 mió. kr.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna

Bjarni Askham Bjarnason

# Viðmerkingar

# § 3 Fíggjarmál

## Felagsútreiðslur

## 3.11.1. Fyrisiting

### 3.11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarjáttan)

Við sáttmálasamráðingum fyri framman verður væntað at neyðugt verður við hægri játtan til virksemið restina av árinum.

Biðið verður um, at játtanin í 2025 við eykajáttan verður hækkað við 300 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 450 | 300 | 750 |
| Útreiðslur | 450 | 300 | 750 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 450 | 300 | 750 |
| **Útreiðslur** | **450** | **300** | **750** |
| 11. Lønir v.m. | 50 | - | 50 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 400 | 300 | 700 |

### 3.11.1.61. Talgildu Føroyar (Løgujáttan)

Virkisskráin var partur av heildarætlanini fyri talglding av samfelagnum í 2015. Avgerð var tikin í 2016-17, at umsitingarskipanin hjá Skráseting Føroya skuldi vera ein integreraður partur av virkisskránni. Í 2019 var kravfestingin liðug og í 2021 var farið undir at menna virkisskránna og umsitingarskipanina við samlaða heitinum Virkið.

Allir lutir í skipanini eru mentir - tó ikki liðugt. Talan er um eina skipan, sum skal brúkast av TAKS, Hagstovuni og Skráseting Føroya, og sum verður umsitin av Gjaldstovuni. Partarnir hjá TAKS og Hagstovuni eru klárir at taka í nýtslu.

Umsitingarskipanin hjá Skráseting Føroya er seinkað og kann ikki takast í nýtslu. Í hesum sambandi var avtalað fyrr í ár, at gera eina glopp-greining (gap analysis) av Virkinum, fyri at gera eina meting av hvussu langa tíð og hvussu nógv tað fer at kosta at fáa skipanina lidna.

Fyribils niðurstøðan frá glopp-greiningini er, at tað eru fleiri týðandi glopp í sambandi við nýtslu av skipanini, sum fara at krevja menning restina av 2025 og partar av 2026.

Tað eru brúktar 26 mió. kr. fram til árslok 2024 til verkætlanina og er hetta meira enn upprunaliga ætlað, sum var 21 mió. kr.

Eykakostnaðurin er serliga vegna arbeiði at menna umsitingarskipanina hjá Skráseting Føroya, sum hevur verið meira avbjóðandi enn væntað.

Eykajáttanartørvurin verður mettur til 2 mió. kr. í 2025.

Játtanartørvurin í 2026 er treytaður av, hvat endaliga glopp-greiningin vísir, sum ikki verður liðug fyrr enn út á heystið 2025, men ein sannlík upphædd við núverandi vitan er 3 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 12.000 | 2.000 | 14.000 |
| Inntøkur | 2.000 | - | 2.000 |
| **21. Talgildu Føroyar 2.0** | | | |
| **Útreiðslur** | **12.000** | **2.000** | **14.000** |
| 11. Lønir v.m. | 3.000 | - | 3.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 9.000 | 2.000 | 11.000 |
| **Inntøkur** | **2.000** | **-** | **2.000** |
| *63. Vanligar flytingarinntøkur* | *2.000* | - | *2.000* |

# Fíggjarmál o.a.

## 3.15.1. Fíggjarfyrisiting v.m.

### 3.15.1.12. Nýggj skattaskipan (Løgujáttan)

Tað gongur væl fram á at menna nýggju skattaskipanina, men tó ikki líka skjótt sum tøka játtanin í 2025 tilskilar. Øll tøka játtanin verður ikki nýtt í 2025, og tískil kann játtanin verða lækkað við 2 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 25.900 | -2.000 | 23.900 |
| **30. Nýggj skattaskipan** | | | |
| **Útreiðslur** | **25.900** | **-2.000** | **23.900** |
| 11. Lønir v.m. | 5.000 | - | 5.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 20.900 | -2.000 | 18.900 |

# Íbúðarmál

## 3.22.4. Útgjaldsskipanir

### 3.22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (Lógarbundin játtan)

Dagførd meting vísir, at nýtslan verður netto 10 mió. kr. hægri í 2025.

Staðfestast má, at lækkaða rentustøðið ikki í eins stóran sum mett fór at lækka útreiðslurnar til rentustuðul. Orsakirnar eru, at lækkaða rentustøðið ikki hava sligið fult ígjøgnum sum rentulækkingar, at lutfallið av bústaðalánum við broytiligari rentu var ov høgt mett, og at nettotilgongdin til bústaðalánsmassan hevur verið hægri enn mett.

Biðið verður tískil um, at játtanin í 2025 við eykajáttan verður hækkað við 10 mió. kr. netto.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 130.100 | 18.600 | 148.700 |
| Inntøkur | 57.600 | 8.600 | 66.200 |
| **01. Rentustuðul** | | | |
| **Útreiðslur** | **130.100** | **18.600** | **148.700** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 130.100 | 18.600 | 148.700 |
| **Inntøkur** | **57.600** | **8.600** | **66.200** |
| *77. Flyting frá kommunum* | *57.600* | *8.600* | *66.200* |

# § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál

## Felagsútreiðslur

### 5.11.1. Fyrisiting

#### 5.11.1.47. Søla av landsins ognum (Løgujáttan)

Landsverk varðar av oljutangum landsins í Sørvági. Oljufelagið, sum hevur leigað tangarnar er givið at brúka teir fyri nøkrum árum síðani. Áhugi er keypa undirlendið við tangunum standandi. Við hesum verður fíggjarlig heimild fingin til vega til ætlaðu søluna.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Inntøkujáttan | - | 1.000 | 1.000 |
| **10.Søla av landsins ognum** | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **1.000** | **1.000** |
| *42. Søla av løgu o.ø.* | *-* | *1.000* | *1.000* |

# Fiskivinna

## 5.34.3. Gransking og menning

### 5.34.3.01. Havstovan (Rakstrarjáttan)

Annar streymmátarin, ið Havstovan síðan 1995 hevur brúkt at máta djúpa rákið í Bankarennuni, er gingin fyri í mai mánaða. Mátingarnar frá honum verða brúktar til at greina fysiska, kemiska og lívfrøðiliga samspælið í okkara havvistskipan, og hvussu hetta ávirkar tað livandi tilfeingi í havinum kring Føroyar.

Ikki ber til at umvæla hesa gomlu útgerð, tí eykalutir til hettar slagið verður ikki framleitt longur.

Tørvur er á at fáa nýggjan streymmátara sum skjótast. Mett verður, at veitingartíðin er 4-6 vikur og kostnaðurin umleið 650 tús. kr. Biðið verður um eykajáttan til keyp av nýggjum streymmátara.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 21.191 | 650 | 21.841 |
| Útreiðslur | 25.691 | 650 | 26.341 |
| Inntøkur | 4.500 | - | 4.500 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 19.537 | 650 | 20.187 |
| **Útreiðslur** | **20.037** | **650** | **20.687** |
| 11. Lønir v.m. | 17.702 | - | 17.702 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.085 | - | 2.085 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 200 | 650 | 850 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 50 | - | 50 |
| **Inntøkur** | **500** | **-** | **500** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *500* | - | *500* |
| **22. Ferðing og atburður hjá toski** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 627 | - | 627 |
| **Útreiðslur** | **627** | **-** | **627** |
| 11. Lønir v.m. | 592 | - | 592 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 35 | - | 35 |
| **23. Fuglakanningarstøð** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 1.027 | - | 1.027 |
| **Útreiðslur** | **1.027** | **-** | **1.027** |
| 11. Lønir v.m. | 997 | - | 997 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 30 | - | 30 |

**45. Verkætlanir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **4.000** | **-** | **4.000** |
| 11. Lønir v.m. | 3.000 | - | 3.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 900 | - | 900 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 100 | - | 100 |
| **Inntøkur** | **4.000** | **-** | **4.000** |
| *63. Vanligar flytingarinntøkur* | *3.000* | - | *3.000* |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *1.000* | - | *1.000* |

# § 6 Uttanríkis- og vinnumál

## Handil og vinna annars

## 6.37.2. Ymiskur studningur

### 6.37.2.04. Endurgjald til skipasmíð (Stuðulsjáttan)

Játtanin til endurgjald til skipasmíð er 4 mió. kr. Higartil í ár eru latnar stuðulstilsagnir fyri slakar 3,4 mió. kr.

Stuðulstilsagnir verða latnar fyri 8% av sáttmálaprísinum, tá undirskrivaður sáttmáli um skipasmíð er móttikin og saman við umsókn um stuðul er viðgjørdur.

Tøk játtan eru góðar 0,6 mió. kr. sum ikki kemur at røkka til fleiri umsóknir.

MEST hevur boðað frá, at sáttmáli um gerð av tvíkilju er um at verða undirskrivaður og at MEST kemur at søkja um 2,4 mió. kr. í endurgjaldi.

Biðið verður tískil um, at játtanin verður hækkað við 1,8 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 4.000 | 1.800 | 5.800 |
| **01. Endurgjald** | | | |
| **Útreiðslur** | **4.000** | **1.800** | **5.800** |
| 53. Stuðul til vinnu | 4.000 | 1.800 | 5.800 |

## 6.37.5. Almennir karmar

### 6.37.5.04. Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarjáttan)

Heilsufrøðiliga starvsstovan húsast í leigaðum hølum á Smyrilsvegnum í Havn. Landsverk hevur gjørt nýggjan leigusáttmála við útleigara við virknaði frá 1. februar 2025, leigan hækkar úr 83.854 kr/mðn upp í 115.000 kr/mðn. Orsøkin til økta leigukostnaðin er, at leigan ikki er hækkað síðani 2014. Lagt kann verða afturat, at leigaðu hølini eru 1.305 fermetrar.

Um leiguavtaluna annars kann upplýsast, at leigan verður prístalsviðgjørd árliga sambært brúkaraprístalinum hjá Hagstovuni. Leigan verður prístalsviðgjørd fyrstu ferð 1. februar 2026.

Meirútreiðslan í 2025 er um 340 tús. kr., sum biðið verður um, at játtanin verður hækkað við.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 22.598 | 340 | 22.938 |
| Útreiðslur | 47.718 | 340 | 48.058 |
| Inntøkur | 25.120 | - | 25.120 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 17.386 | 340 | 17.726 |
| **Útreiðslur** | **28.006** | **340** | **28.346** |
| 11. Lønir v.m. | 20.883 | - | 20.883 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5.354 | - | 5.354 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 600 | - | 600 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.169 | 340 | 1.509 |
| **Inntøkur** | **10.620** | **-** | **10.620** |
| *25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld* | *10.620* | - | *10.620* |
| **21. Vanligt virksemi, kanningarstovur** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 5.212 | - | 5.212 |
| **Útreiðslur** | **17.412** | **-** | **17.412** |
| 11. Lønir v.m. | 12.540 | - | 12.540 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 4.207 | - | 4.207 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 665 | - | 665 |
| **Inntøkur** | **12.200** | **-** | **12.200** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *12.200* | - | *12.200* |
| **22. Umsiting av aliloyvum** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **1.800** | **-** | **1.800** |
| 11. Lønir v.m. | 1.600 | - | 1.600 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 200 | - | 200 |
| **Inntøkur** | **1.800** | **-** | **1.800** |
| *25. Eftirlits- og umsjónaravgjøld* | *1.800* | - | *1.800* |
| **45. Inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **500** | **-** | **500** |
| 11. Lønir v.m. | 300 | - | 300 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 200 | - | 200 |
| **Inntøkur** | **500** | **-** | **500** |
| *63. Vanligar flytingarinntøkur* | *500* | - | *500* |

# § 7 Barna- og útbúgvingarmál

## Almannamál

### 7.21.3. Barnastuðul

#### 7.21.3.01. Barnavernd (Lógarbundin játtan)

Eitt barn er komið heimaftur til Føroyar í hesum árinum, og talið á stovnsplássum er tí lækka úr trimum til tvey stovnspláss. Eisini er eitt stovnspláss vorðið bíligari, enn tað var fyrst í árinum. Játtanin fyri 2025 kann tí lækkað við 1 mió. kr.

Virksemið í 2026 verður væntandi eisini minni, og er hetta framskrivað í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 8.377 | -1.577 | 6.800 |
| Inntøkur | 1.612 | -562 | 1.050 |
| **04. Barnavernd** | | | |
| **Útreiðslur** | **7.277** | **-1.577** | **5.700** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 7.277 | -1.577 | 5.700 |
| **Inntøkur** | **1.612** | **-562** | **1.050** |
| *77. Flyting frá kommunum* | *1.612* | *-562* | *1.050* |
| **05. Advokatumboðan** | | | |
| **Útreiðslur** | **1.100** | **-** | **1.100** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1.100 | - | 1.100 |

#### 7.21.3.14. Barnaverndarstovnar (Rakstrarjáttan)

Talið á innskrivaðum børnum í skipanini er lækkað í mun til fyrst í árinum, og virksemið hjá Barnaverndarstovnunum er harvið minni enn vænta. Av tí sama hevur nakað av umskipan verið av virkseminum, og onkur stovnur er í tí sambandi latin aftur, og børnini flutt á aðrar stovnar í eindini. Játtanin fyri 2025 kann tí lækkað við 1,7 mió. kr.

Um umstøður eru til tað verða børn útskrivaði tá ið tey eru ment somikið, at tørvur ikki longur er á sosialnámsfrøðiligari viðgerð. Tá fara tey til fosturs, um so er at fosturfamilja er tøk, ella tey fara heim aftur til foreldrini, ella verða útskrivaði av Føroya Kærustovni, vegna aldur, tá tey eru millum 18 til 21 ár, sambært barnaverndarlógini. Í ávísum føri fara ung, sum hava varandi tørv, í annað bútilboð hjá Almannaverkinum, eftir 18 ára aldur.

Virksemið í 2026 verður eisini minni, og er hetta framskrivað í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 56.811 | -1.700 | 55.111 |
| Útreiðslur | 63.990 | -1.700 | 62.290 |
| Inntøkur | 7.179 | - | 7.179 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 56.811 | -1.700 | 55.111 |
| **Útreiðslur** | **63.990** | **-1.700** | **62.290** |
| 11. Lønir v.m. | 55.575 | -1.500 | 54.075 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.074 | -200 | 2.874 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 200 | - | 200 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.954 | - | 2.954 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 226 | - | 226 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.961 | - | 1.961 |
| **Inntøkur** | **7.179** | **-** | **7.179** |
| *77. Flyting frá kommunum* | *7.179* | - | *7.179* |

# Útbúgving og gransking

## 7.23.2. Fólkaskúlin v.m.

### 7.23.2.02. Sernám (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 20. Sernám**
Í heysthálvuni hevur Sernám eykaútreiðslur í sambandi við tillagingar, sum eru neyðugar at gera á stovninum í sambandi við at styrkja sálarliga arbeiðsumhvørvið.

Biðið verður um eykajáttan á 300 tús. kr. til øktu útreiðslurnar.

**Undirkonta 23. Skúlin á Trøðni**
Næmingatalið á Skúlanum á Trøðni er økt heysthálvuna, og krevur tað tveir lærarar afturat, umframt at virksemið á skúlanum í 2025 er samlað nakað dýrari enn mett. Eisini hevur skúlin eykaútreiðslur í sambandi við stjóraskiftið.

Biðið verður um eykajáttan á 950 tús. kr. til øktu útreiðslurnar.

Framskrivað fyri fult ár verður kostnaðurin av økta undirvísingarvirkseminum mettur til 1,2 mió. kr., og er hetta tikið við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

**Undirkonta 24. Frítíðarskúli, skúlin á Trøðni**
Heildagstilboðið, sum er sett í verk sum ein royndarverkætlan frá skúlaárinum 2025/26, verður veitt í hølunum hjá Skúlanum á Trøðni, har serskúli og frítíðartilboðið nýta somu hølir. Bæði serskúli og frítíðartilboð hava atgongd og brúksrætt til øll fak- og felagshøli, innbúgv, akfør og aðra útgerð.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skipar fyri at hølini eru sett í hóskandi stand til at rúma serskúla og frítíðartilboðið í somu hølum.

Skúlaárið 2024/25 hevur Tórshavnar kommuna leiga fyristingarlonina hjá Skúlanum á Trøðni, ið Sernám áður húsaðist í, til frítíðartilboð hjá kommununi, ið nú er partur av heildagstilboðnum. Kommunan hevur innrættað hølini til endamálið, og hevur í tí sambandi keypt innbúgv fyri áleið 400 tús. kr. Talan er um innbúgv til børn og starvsfólk, útgerð til sansarúm og hvílirúm.

Nú samstarvsavtala um at skipa heildagstilboðið er gjørd millum Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið er ætlanin at heildagstilboðið skal keypa innbúgvið frá Tórshavnar kommunu. Hartil verður mett neyðugt at keypa nakað av innbúgvi afturat í hølir, ið stóðu tóm, ella áður hava verið nýtt til skúlastovur, so hesi kunnu innrættast til eisini at verða hóskandi til frítíðarpartin.

Í sambandi við at heildagstilboðið er komið afturat, og so nógv børn eru á skúlanum heilan dag, hevur skúlin tørv á einum minni bussi afturat bussinum, sum skúlin hevur, eins og mælt verður til í álitinum um heildagstilboð í Skúlanum á Trøðni. Bussurin hevur tvey endamál, eitt er flutningur til virksemi uttanfyri húsið, og hitt er at brúka bussin sum eitt námsfrøðiligt amboð í spentum støðum har einkult børn hava tørv á at flyta úr aktuellu støðuni og koma burtur úr umhvørvinum eina løtu.

Bussurin, sum skúlin hevur í dag hevur pláss til upp til 13 børn, og um rullistólur skal við, verður talið av setrum væl minni. Bussurin er sostatt ov lítið til at nøkta økta tørvin, nú virksemið á skúlanum er so

nógv økt. Hartil er tað ein avbjóðing við verandi bussi at tað krevst busskoyrikort, ið ger tað torført hjá heildagstilboðnum at nýta hann til teirra virksemi.

Biðið verður um eykajáttan á 1.050 tús. kr. til at keypa innbúgv og ein nýggjan buss.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 48.293 | 2.300 | 50.593 |
| Útreiðslur | 52.151 | 2.300 | 54.451 |
| Inntøkur | 3.858 | - | 3.858 |
| **20. Sernám** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 25.887 | 300 | 26.187 |
| **Útreiðslur** | **25.887** | **300** | **26.187** |
| 11. Lønir v.m. | 22.217 | 300 | 22.517 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 2.396 | - | 2.396 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 196 | - | 196 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 878 | - | 878 |
| 72. Flytingar frá landi til kommunur | 200 | - | 200 |
| **23. Skúlin á Trøðni** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 22.406 | 950 | 23.356 |
| **Útreiðslur** | **23.306** | **950** | **24.256** |
| 11. Lønir v.m. | 22.013 | 950 | 22.963 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.173 | - | 1.173 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 70 | - | 70 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 40 | - | 40 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 10 | - | 10 |
| **Inntøkur** | **900** | **-** | **900** |
| *77. Flyting frá kommunum* | *900* | - | *900* |
| **24. Frítíðarskúli, skúlin á Trøðni** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | 1.050 | 1.050 |
| **Útreiðslur** | **2.958** | **1.050** | **4.008** |
| 11. Lønir v.m. | 2.458 | - | 2.458 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 400 | 450 | 850 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 100 | 600 | 700 |
| **Inntøkur** | **2.958** | **-** | **2.958** |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *833* | - | *833* |
| *77. Flyting frá kommunum* | *2.125* | - | *2.125* |

### 7.23.2.06. Skúlatilboð til ung við breki (Rásin) (Rakstrarjáttan)

Rásin hevur ein minni buss til 9 fólk, sum er 10 ára gamal og slitin og kostar nógv í verkstaðsútreiðslum. Rásin hevur tí søkt um 600 tús. kr. til keyp av nýggjum bussi.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið heldur, at Rásin hevur tørv á einum meira álítandi bussi, nú næmingatalið á skúlanum verður tvífaldað.

Biðið verður um eykajáttan á 600 tús. kr. til hetta endamál.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 6.124 | 600 | 6.724 |
| Útreiðslur | 6.334 | 600 | 6.934 |
| Inntøkur | 210 | - | 210 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 6.124 | 600 | 6.724 |
| **Útreiðslur** | **6.334** | **600** | **6.934** |
| 11. Lønir v.m. | 5.824 | - | 5.824 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 450 | - | 450 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 60 | 600 | 660 |
| **Inntøkur** | **210** | **-** | **210** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *210* | - | *210* |

## 7.23.5. Fólkaupplýsing

### 7.23.5.02. Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Til Ítróttaháskúlan hoyrir eitt næmingaheim, ið kann húsa 48 næmingum. Næmingaheimið er staðsett á sandinum í Vági og var tikið í nýtslu í 2021. Bústaðir eigur næmingaheimið og leigar tað til Ítróttaháskúlan.

Til at fíggja raksturin av skúlavirkseminum kann Ítróttaháskúlin, sambært løgtingslóg nr. 101 frá 1. desember 1978 um studning til fólkaháskúlar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 29. mai 2017, fáa m.a. 70% av øllum góðkendum rakstrarútreiðslum í stuðli úr landskassanum. Írestandi 30% skal skúlin fíggja við inntøkum frá m.a. næmingagjøldum og ymiskum skeiðsvirksemi, umframt at landið letur næmingastuðul sambært háskúlalógini.

Leigumálið millum Bústaðir og Ítróttaháskúlan skal so vítt gjørligt hvíla í sær sjálvum av einum parti av næmingagjaldinum og næmingastuðlinum umframt aðrari leigu.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Fíggjarmálaráðið eru í samráðingum við Bústaðir um leigutreytir, undir hesum at greina, hvussu nógv næmingagjøld og næmingastuðul umframt onnur leiga kunnu rinda fyri næmingaheimið yvir eitt áramál. Restin - tað, sum ikki verður goldið av næmingunum og aðrari leigu - letur landið í løgustuðli til næmingaheimið.

Løgustuðulin verður mettur til 7,3 mió. kr.

Ítróttaháskúlin hevur síðani 2021 borið allan leigukostnaðin, áleið 350 tús. kr. árliga í meirútreiðslum í mun til um løgustuðul var latin tá ið næmingaheimið lat upp. Hóast sera nógv virksemi, skerjingar í rakstrinum og høgt næmingagjald hevur skúlin ikki megnað at fingið tær inntøkur, sum skulu til, fyri at rinda leiguútreiðslurnar og skúlans part av rakstrinum. Hetta hevur viðført, at skúlin hevur havt undirskot í 2024 og eitt tepurt gjaldføri, sum ávegisgjøld til rakstrarstuðul hava fíggjað. Talan er um 800 tús. kr. Sama fer at gera seg galdandi fyri 2025. Hesin meirútgoldni stuðul um átti at verið mótroknaður í komandi ávegisgjøldum, men eftirsum hetta er vegna ov høga leigukostnaðin er ætlanin at eftirgeva meirútgoldna stuðulin í sambandi við tillagingina av leigumálinum.

**Átekning**
Landsstýrismanninum verður heimilað at samráðast við Bústaðir um treytir í leigusáttmála um næmingaheimið, undir hesum hvussu løgustuðul upp á í mesta lagi 7,3 mió. kr. kann verða latin.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 350 | 7.300 | 7.650 |
| **01. Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul** | | | |
| **Útreiðslur** | **350** | **7.300** | **7.650** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | 350 | 7.300 | 7.650 |

## 7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking

### 7.23.6.15. Fróðskaparsetur Føroya (Løgujáttan)

Tøka løgujáttanin til kampus hjá Fróðskaparsetrið Føroya er hægri í 2025 enn nýtslan verður mett til. Játtanin fyri 2025 kann tí verða lækkað við 7,3 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 45.000 | -7.300 | 37.700 |
| **10. Fróðskaparsetur Føroya** | | | |
| **Útreiðslur** | **45.000** | **-7.300** | **37.700** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 45.000 | -7.300 | 37.700 |

### 7.23.6.18. Avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu (Løgujáttan)

Ætlaða sølan av pørtum av Hoydølum til Tórshavnar kommunu er slept. Síðani er avgerð er tikin um, at Almanna- og mentamálaráðið skal yvirtaka bygningarnar í Hoydølum. Treytaða skeyti millum Føroya Landsstýri og Tórshavnar kommunu er tískil fallið burtur.

Í staðin samráðast Føroya Landsstýri og Tórshavnar kommuna um eina avtalu, ið inniber at

- Tórshavnar kommuna keypir lonirnar við studentaskúlan á matr. 18, Hoyvík, fyri 3 mió. kr.,
- Tórshavnar kommuna rindar leigu fyri brúk av lonunum á matr. 18, Hoyvík og Sanatoriivegi 11-15 frá juli 2024, og
- tillagingar verða gjørdar í mótrokningini fyri íløgur í Sjóvinnuhúsinum í sambandi við keypi av Venjingarskúlanum, vísandi til at Fróðskaparsetur Føroya ikki er farið úr Sjóvinnuhúsinum til væntaða tíð.

Samanumtikið væntast avtalan at innibera, at Tórshavnar kommuna rindar landinum 1.577 tús. kr.

Avtalan um at Tórshavnar kommuna keypir lonirnar á matr. 18, Hoyvík, er treytað av, at lonirnar kunnu verða standandi inntil 31. desember 2028. Verandi loyvi gongur út 1. juli 2026. Umbønin um leinging er til viðgerðar hjá friðingarmyndugleikunum.

## Átekning

Heimilað verður landsstýrismanninum at fremja avtalu við Tórshavnar kommunu um avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | - | 1.423 | 1.423 |
| Inntøkur | - | 3.000 | 3.000 |
| **10.Avhendan av Studentaskúlanum í Hoydølum til Tórshavnar kommunu** | | | |
| **Inntøkur** | **-** | **3.000** | **3.000** |
| *42. Søla av løgu o.ø.* | *-* | *3.000* | *3.000* |
| **11. Útvegan av Venjingarskúlanum frá Tórshavnar kommunu** | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **1.423** | **1.423** |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | 1.423 | 1.423 |

# § 11 Heilsumál

## Heilsumál

### 11.20.2. Heilsutænastur

#### 11.20.2.02. Heilsutrygd (Rakstrarjáttan)

Heilsutrygd brúkar egna KT-skipan til avrokning við t.d. kommunulæknar. Við at menna avrokningarskipanina fer at bera til at gera tað sjálvvirkandi hjá borgarunum at undirskriva hjá kommunulækna. Ætlanin er eisini at ávísa kommunulæknavitjanin skal koma á Vangan.

Avrokning við kommunulæknar byggir í dag á eina gamla avrokningarskipan, sum byggir á tøkni, sum ikki verður dagførd, og veitarin hevur gjørt vart við, at hetta kann føra við sær stórar avbjóðingar, og í ringasta føri, at skipanin verður óvirkin. Tí er tað átrokandi, at avrokningarskipanin við kommunulæknar verður ment.

Heilsutrygd hevur sagt frá, at útgerð sum skermar og skannarar og tað at menna nýggju skipanina tilsamans kostar umleið 1,6 mió. kr.

Biðið verður um 800 tús. kr. til endamálið í 2025.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 12.325 | 800 | 13.125 |
| Útreiðslur | 12.325 | 800 | 13.125 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 12.325 | 800 | 13.125 |
| **Útreiðslur** | **12.325** | **800** | **13.125** |
| 11. Lønir v.m. | 9.109 | - | 9.109 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 700 | 800 | 1.500 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 150 | - | 150 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 366 | - | 366 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.000 | - | 2.000 |

#### 11.20.2.03. Heilsutrygdarveitingar (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 20. Vanliga virksemi**
Framrokningar hjá Heilsutrygd vísa, at útreiðslurnar verða 9,5 mió. kr. lægri enn játtað.

Orsøkin er serliga, at metingin var ov høg vegna útreiðslur til heilivág og gjøld til kommunulæknar.

Biðið verður um, at játtanin verður lækkað við 9,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 297.720 | -9.500 | 288.220 |
| Útreiðslur | 297.720 | -9.500 | 288.220 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 262.320 | -9.500 | 252.820 |
| **Útreiðslur** | **262.320** | **-9.500** | **252.820** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 259.320 | -9.500 | 249.820 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 3.000 | - | 3.000 |
| **21. Hjálparráð** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 35.400 | - | 35.400 |
| **Útreiðslur** | **35.400** | **-** | **35.400** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 35.400 | - | 35.400 |

### 11.20.2.04. Kommunulæknaskipanin (Rakstrarjáttan)

Framrokningar hjá Heilsutrygd vísa, at útreiðslurnar verða 1,5 mió. kr. lægri enn játtað.

Játtanin var upprunaliga 18.884 tús. kr. men var lækkað við 500 tús. kr. í eykajáttanarumfarinum í vár.

Játtanin verður brúkt til lønir til kommunulæknar og viðtalustarvsfólk. Nýggjar metingar vísa, at játtanin kann verða lækkað enn meiri.

Biðið verður um, at játtanin verður lækkað við 1,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 18.384 | -1.500 | 16.884 |
| Útreiðslur | 21.384 | -1.500 | 19.884 |
| Inntøkur | 3.000 | - | 3.000 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 18.384 | -1.500 | 16.884 |
| **Útreiðslur** | **21.384** | **-1.500** | **19.884** |
| 11. Lønir v.m. | 19.484 | -1.500 | 18.484 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.400 | - | 1.400 |
| **Inntøkur** | **3.000** | **-** | **3.000** |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *3.000* | - | *3.000* |

### 11.20.2.09. Apoteksverkið (Løgujáttan)

Bygningurin hjá Suðuroyar apoteki er illa fongdur av soppi. Bygningurin er 555 fermetrar til støddar, og neyðugt verður at gera eina høvuðsumvæling av øllum bygninginum.

Kostnaðarmeting fyri høvuðsumvælingina er tilsamans 13,3 mió. kr. Endurhýsing av virkseminum, prosjektering og fyrireiking av arbeiðinum er mett at kosta 4,5 mió. kr.

Biðið verður um 4,5 mió. kr. í eykajáttan til endamálið. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 eru 8,8 mió. kr. settar av til endamálið.

**Átekning**
Landsstýriskvinnuni verður heimilað at halda útreiðslur fyri 13,3 mió. kr. til umvæling av Suðuroyar Apoteki á Tvøroyri og at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 4.500 | 4.500 |
| **10. Apoteksverkið** | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **4.500** | **4.500** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | - | 4.500 | 4.500 |

## 11.20.3. Sjúkrahúsverkið v.m.

### 11.20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan)

**Undirkonta 22. Serviðgerð uttanlands**
Mett er, at talið av sjúklingum sum skulu til viðgerð uttanlands er lægri enn upprunaliga mett.

Landssjúkrahúsið ger regluliga metingar við grundarlagi í tali av sjúklingum, ið verða sendir uttanlands, við framroknaðum miðalkostnaði fyri undanfarin ár. Talið av sjúklingum, sum eru sendir til viðgerð uttanlands higartil í ár, er longu lækkað samanborið við upprunaligu metingina. Hædd er tikin fyri hesum í framrokningunum fyri 2026.

Biðið verður um, at játtanin verður lækkað við 2 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 1.011.843 | -2.000 | 1.009.843 |
| Útreiðslur | 1.088.218 | -2.000 | 1.086.218 |
| Inntøkur | 75.375 | - | 75.375 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 770.667 | - | 770.667 |
| **Útreiðslur** | **811.567** | **-** | **811.567** |
| 11. Lønir v.m. | 584.696 | - | 584.696 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 215.916 | - | 215.916 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 6.705 | - | 6.705 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 4.000 | - | 4.000 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 250 | - | 250 |
| **Inntøkur** | **40.900** | **-** | **40.900** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *39.900* | *-* | *39.900* |
| *29. Ymsar rakstrarinntøkur* | *1.000* | *-* | *1.000* |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **22. Serviðgerð uttanlands** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 154.074 | -2.000 | 152.074 |
| **Útreiðslur** | **164.174** | **-2.000** | **162.174** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 164.174 | -2.000 | 162.174 |
| **Inntøkur** | **10.100** | **-** | **10.100** |
| *65. Flytingarinntøkur úr útlandinum* | *10.100* | - | *10.100* |
| **25. Flutningur og uppihald** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 29.255 | - | 29.255 |
| **Útreiðslur** | **29.255** | **-** | **29.255** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 29.255 | - | 29.255 |
| **26. Sjúklingahotellið Tórshavn** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 27.934 | - | 27.934 |
| **Útreiðslur** | **30.169** | **-** | **30.169** |
| 11. Lønir v.m. | 16.313 | - | 16.313 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 6.137 | - | 6.137 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 67 | - | 67 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 7.652 | - | 7.652 |
| **Inntøkur** | **2.235** | **-** | **2.235** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *2.235* | - | *2.235* |
| **27. KT-øki heilsuverksins** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 10.841 | - | 10.841 |
| **Útreiðslur** | **11.841** | **-** | **11.841** |
| 11. Lønir v.m. | 6.049 | - | 6.049 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 5.482 | - | 5.482 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 70 | - | 70 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 240 | - | 240 |
| **Inntøkur** | **1.000** | **-** | **1.000** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *1.000* | - | *1.000* |
| **28. Avseting til serlæknar** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 5.200 | - | 5.200 |
| **Útreiðslur** | **5.200** | **-** | **5.200** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 5.200 | - | 5.200 |
| **31. Steno miðstøðin** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **5.000** | **-** | **5.000** |
| 11. Lønir v.m. | 3.000 | - | 3.000 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.500 | - | 1.500 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 500 | - | 500 |
| **Inntøkur** | **5.000** | **-** | **5.000** |
| *65. Flytingarinntøkur úr útlandinum* | *5.000* | - | *5.000* |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **32. Krabbameinsátøk** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 3.000 | - | 3.000 |
| **Útreiðslur** | **3.000** | **-** | **3.000** |
| 11. Lønir v.m. | 3.000 | - | 3.000 |
| **33. H-bygningurin, kliniskt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 11.172 | - | 11.172 |
| **Útreiðslur** | **11.172** | **-** | **11.172** |
| 11. Lønir v.m. | 11.172 | - | 11.172 |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi (Vaskarí)** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | -300 | - | -300 |
| **Útreiðslur** | **15.000** | **-** | **15.000** |
| 11. Lønir v.m. | 8.100 | - | 8.100 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.700 | - | 3.700 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 500 | - | 500 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.700 | - | 2.700 |
| **Inntøkur** | **15.300** | **-** | **15.300** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *15.300* | - | *15.300* |
| **45. Stuðulsfíggjað virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **840** | **-** | **840** |
| 11. Lønir v.m. | 672 | - | 672 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 168 | - | 168 |
| **Inntøkur** | **840** | **-** | **840** |
| *63. Vanligar flytingarinntøkur* | *840* | - | *840* |

## 11.20.3.19. Serstakur sjúkrahúsheilivágur (Rakstrarjáttan)

Ráðið fyri serstakan sjúkrahúsheilivág, sum er ráðgevandi hjá landsstýriskvinnuni, ásetir leiðreglur fyri nýtsluna av serstøkum sjúkrahúsheilsivági í sjúkrahúsverkinum og hevur eftirlit við nýtsluni av heilivágnum.

Ráðið fyri serstakan sjúkrahúsheilivág gjørdi meting av útreiðslugongdini í vár, og varð játtanin lækkað við 3 mió. kr. við eykajáttanarløgtingslógini í vár. Ráðið fyri serstakan sjúkrahúsheilivág hevur nú gjørt nýggja meting, sum vísir, at útreiðslurnar kunnu lækka áleið 3 mió. kr. afturat.

Biðið verður um, at játtanin verður lækkað við 3 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 70.460 | -3.000 | 67.460 |
| Útreiðslur | 70.460 | -3.000 | 67.460 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 70.460 | -3.000 | 67.460 |
| **Útreiðslur** | **70.460** | **-3.000** | **67.460** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 70.460 | -3.000 | 67.460 |

# § 12 Almanna- og mentamál

## Almannamál

### 12.21.1. Fyrisiting

#### 12.21.1.02. Almannaverkið (Rakstrarjáttan)

Deildin fyri hjálpartól hevur eina vaskimaskinu, sum verður brúkt til at vaska øll tól, sum verða lænt ella leigað út, og koma inn aftur, so sum sengur, koyristólar og annað, so hesi eru klár at læna ella leiga út aftur.

Vaskimaskinan, sum er frá 2010, er í ringum standi og hevur kravt fleiri umvælingar í seinastuni. Í sambandi við at veitarin hevur verið í Føroyum og umvælt maskinuna, hevur veitarin boðað frá, at hetta modellið finst ikki longur og tað er torført at útvega eykalutir til maskinuna. Harumframt er hon í so vánaligum standi, at mælt verður til at keypa nýggja maskinu.

Deildin fyri hjálpartól megnar ikki at røkja sínar uppgávur við ongari vaskimaskinu, og tí verður mett neyðugt at útvega nýggja vaskimaskinu skjótast møguligt. Gongur maskinan fyri, verður tørvur á 2-3 ársverkum at vaska manuelt og hølum, har tólini kunnu verða vaskað. Tað eru umleið 6 túsund tól, sum verða leigað ella lánt út um árið.

Almannaverkið hevur biðið um tilboð frá einum veitara. Við uppsetan er kostnaðurin umleið 2 mió. kr. Útveganartíð saman við uppsetan er umleið 2-3 mánaðir.

Biðið verður um, at játtanin verður hækkað við 2 mió. kr. til at útvega nýggja vaskimaskinu.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 75.459 | 2.000 | 77.459 |
| Útreiðslur | 105.050 | 2.000 | 107.050 |
| Inntøkur | 29.591 | - | 29.591 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 64.519 | - | 64.519 |
| **Útreiðslur** | **92.423** | **-** | **92.423** |
| 11. Lønir v.m. | 76.798 | - | 76.798 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 10.443 | - | 10.443 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2.247 | - | 2.247 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.935 | - | 2.935 |
| **Inntøkur** | **27.904** | **-** | **27.904** |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *27.904* | - | *27.904* |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **21. Hjálpartól** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 9.069 | 2.000 | 11.069 |
| **Útreiðslur** | **9.069** | **2.000** | **11.069** |
| 11. Lønir v.m. | 6.107 | - | 6.107 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.550 | - | 1.550 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 143 | 2.000 | 2.143 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 669 | - | 669 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 600 | - | 600 |
| **22. Teknmálstulkatænastan** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 1.856 | - | 1.856 |
| **Útreiðslur** | **2.917** | **-** | **2.917** |
| 11. Lønir v.m. | 2.767 | - | 2.767 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 100 | - | 100 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 50 | - | 50 |
| **Inntøkur** | **1.061** | **-** | **1.061** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *1.061* | - | *1.061* |
| **24. Fakliga nevndin fyri børn við serligum tørvi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 15 | - | 15 |
| **Útreiðslur** | **15** | **-** | **15** |
| 11. Lønir v.m. | 15 | - | 15 |
| **40. Inntøkufíggjað virksemi, Hjálpartólamiðstøðin** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **626** | **-** | **626** |
| 11. Lønir v.m. | 126 | - | 126 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 50 | - | 50 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 400 | - | 400 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 50 | - | 50 |
| **Inntøkur** | **626** | **-** | **626** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *626* | - | *626* |

## 12.21.1.11. Brekumboðið (Rakstrarjáttan)

Orsakað av, at setan av brekumboðnum er seinkað, verður mett, at játtanin kann lækka við 450 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 1.000 | -450 | 550 |
| Útreiðslur | 1.000 | -450 | 550 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 1.000 | -450 | 550 |
| **Útreiðslur** | **1.000** | **-450** | **550** |
| 11. Lønir v.m. | 700 | -450 | 250 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 300 | - | 300 |

# 12.21.3. Barnastuðul

## 12.21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (Lógarbundin játtan)

Útreiðslurnar til barnapening veittan í forskoti hava verið lækkandi seinastu árini, og sambært gongdini higartil í ár halda tær fram við at lækka. Mett verður, at játtanin kann lækka við 600 tús. kr. Henda gongdin sæst eisini aftur í inngjøldunum. Mett verður, at inngjøldini skulu lækka við 400 tús. kr.

Biðið verður um, at samlaða játtanin til høvuðskontuna verður lækkað við 200 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | -409 | -200 | -609 |
| **01. Forskotsrindan** | | | |
| **Útreiðslur** | **9.584** | **-600** | **8.984** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 9.584 | -600 | 8.984 |
| **02. Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi** | | | |
| **Útreiðslur** | **-9.993** | **400** | **-9.593** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | -9.993 | 400 | -9.593 |

## 12.21.3.06. Barnaískoyti (Lógarbundin játtan)

Barnaískoyti verður útgoldið hvønn ársfjórðing. Útgjaldið fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2025 vísir, at neyðugt verður at hækka játtanina við 350 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 14.360 | 350 | 14.710 |
| **01. Barnaískoyti** | | | |
| **Útreiðslur** | **14.360** | **350** | **14.710** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 14.360 | 350 | 14.710 |

### 12.21.3.09. Familjuískoyti (Lógarbundin játtan)

Framrokningar vísa, at játtanin til Familjuískoyti kann lækka við 500 tús. kr. Orsøkin er, at tað eru færri borgarar, sum fáa veiting.

Færri hava søkt um orkuískoyti í 2025 samanborið við 2024. Hóast allar umsóknir enn eru ikki avgreiddar, verður mett, at játtanin kann lækka við 300 tús. kr.

Samlað verður játtanin til høvuðskontuna lækkað við 800 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 12.310 | -800 | 11.510 |
| **01. Familjuískoyti** | | | |
| **Útreiðslur** | **9.860** | **-500** | **9.360** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 9.860 | -500 | 9.360 |
| **03. Orkuískoyti** | | | |
| **Útreiðslur** | **2.450** | **-300** | **2.150** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 2.450 | -300 | 2.150 |

## 12.21.4. Sjúkradagpeningur

### 12.21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin játtan)

Framrokningar vísa, at neyðugt verður at hækka játtanina til undirkontu 01. Løntakarar við 900 tús. kr. Fleiri borgarar hava higartil í ár fingið dagpening samanborið við sama tíðarskeið í 2024. Í miðal eru umleið 10 fleiri um vikuna, sum hava fingið útgjald. Í januar til juli 2024 vóru í miðal 276 borgarar um vikuna, sum fingu útgjald. Fyri sama tíðarskeið í ár, hava tað verið í miðal 287 borgarar.

Inngjøldini frá arbeiðsgevarunum verða væntandi hægri enn mett í fíggjarlógini. Framskrivingar vísa, at inntøkurnar verða 3,5 mió. kr. hægri.

Biðið verður um, at samlaða játtanin verður lækkað við 2,6 mió. kr. netto.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 100.383 | 900 | 101.283 |
| Inntøkur | 16.531 | 3.500 | 20.031 |
| **01. Løntakarar** | | | |
| **Útreiðslur** | **96.556** | **900** | **97.456** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 96.556 | 900 | 97.456 |
| **Inntøkur** | **4.410** | **-** | **4.410** |
| *63. Vanligar flytingarinntøkur* | *4.410* | *-* | *4.410* |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **02. Sjálvboðin trygging** | | | |
| **Útreiðslur** | **2.517** | **-** | **2.517** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 2.517 | - | 2.517 |
| **Inntøkur** | **693** | **-** | **693** |
| *63. Vanligar flytingarinntøkur* | *693* | *-* | *693* |
| **04. Gjald fyri læknaváttanir** | | | |
| **Útreiðslur** | **1.310** | **-** | **1.310** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1.310 | - | 1.310 |
| **09.Arbeiðsgevarans partur, dagpengar** | | | |
| **Inntøkur** | **11.428** | **3.500** | **14.928** |
| *63. Vanligar flytingarinntøkur* | *11.428* | *3.500* | *14.928* |

## 12.21.6. Eldri og serforsorg

### 12.21.6.02. Bústovnar o.a. (Løgujáttan)

Tøka løgujáttanin til bústovnar er hægri í 2025 enn nýtslan verður mett til. Játtanin fyri 2025 kann tí verða lækkað við 1 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 24.250 | -1.000 | 23.250 |
| **10. Bústovnar o.a.** | | | |
| **Útreiðslur** | **24.250** | **-1.000** | **23.250** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 24.250 | -1.000 | 23.250 |

### 12.21.6.09. Trivnaðartænastur (Rakstrarjáttan)

Seinastu tíðina er talið av børnum við fjølbreki, sum hava tørv á umlætting frá Trivnaðartænastuni í Vágunum og í Eysturoynni, økt.

Tað ber til at veita børnunum tænastu í verandi tilboðum, men tað krevur játtan til eina náttarvakt og eitt fulltíðarstarv afturat. Harumframt verður neyðugt at umskipa ein part av virkseminum í annað leigumál.

Biðið verður um, at játtanin verður hækkað við 555 tús. kr. í ár til endamálið. Hetta krevur at játtaðar verða 1.660 tús. kr. afturat í 2026, tí tá verður talan um fult virksemi, íalt 2.215 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 496.777 | 555 | 497.332 |
| Útreiðslur | 510.892 | 555 | 511.447 |
| Inntøkur | 14.115 | - | 14.115 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 471.475 | 555 | 472.030 |
| **Útreiðslur** | **485.590** | **555** | **486.145** |
| 11. Lønir v.m. | 426.901 | 510 | 427.411 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 18.893 | - | 18.893 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 2.923 | - | 2.923 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 10.478 | 45 | 10.523 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 1.132 | - | 1.132 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 25.263 | - | 25.263 |
| **Inntøkur** | **14.115** | **-** | **14.115** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *13.682* | - | *13.682* |
| *29. Ymsar rakstrarinntøkur* | *433* | - | *433* |
| **21. Virksemi uttanlands** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 25.302 | - | 25.302 |
| **Útreiðslur** | **25.302** | **-** | **25.302** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 12.329 | - | 12.329 |
| 51. Tilskot til útlandið o.a. | 12.923 | - | 12.923 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 50 | - | 50 |

## 12.21.6.25. Bústovnar, løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Bústaðir hevur bygt íbúðabygningar á Toftum og í Berjabrekku og leigar teir til Almannaverkið.

Í eykajáttan varð løgustuðul latin til verkætlanina hjá Bústøðum viðvíkjandi bústaðarpartinum hjá Húsarhaldsskúlanum í Klaksvík. Á sama hátt verður løgustuðul latin til hesar verkætlanirnar hjá Bústøðum, har Almannaverkið leigar íbúðabygningarnar.

Almannaverkið hevur eina stigaskipan, sum ásetir húsaleigu, alt eftir stødd og støðumeting. Løgustuðulin skal gera, at leigan verður í samsvari við stigaskipanina

Ongin sáttmáli er enn um bygningin á Toftum. Mett verður fyribils, at løgustuðulin til ta verkætlanina skal vera 4,8 mió. kr.

Leigan í Berjabrekku er fitt hægri enn ásetta leiga í stigaskipanini. Mett verður fyribils, at løgustuðulin til ta verkætlanina skal vera 3,5 mió. kr.

### Átekning

Landsstýrismanninum verður heimilað at samráðast við Bústaðir um treytir í leigusáttmála um tveir íbúðabygningar, sum Almannaverkið leigar, undir hesum hvussu løgustuðul upp á í mesta lagi 8,3 mió. kr. kann verða latin.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 8.300 | 8.300 |
| **01. Bústovnar, løgustuðul** | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **8.300** | **8.300** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | 8.300 | 8.300 |

## 12.21.7. Sosialar skipanir

### 12.21.7.01. Almannatrygd (Lógarbundin játtan)

Framrokningar vísa, at neyðugt verður at hækka játtanina til undirkontu 01. Fyribils hjálp við 1.500 tús. kr. og játtanina til undirkontu 02. Varandi uppihaldsveiting við 270 tús. kr., tí meira er útgoldið higartil í ár í mun til sama tíðarskeið í 2024.

Játtanin til undirkontu 03. Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur kann lækka við 200 tús. kr.

Mett verður, at játtanin til undirkontu 06. Stuðul til hjálparráð kann lækka við 3,7 mió. kr. Tað er framvegis trupult at útvega egnaðar bilar til málbólkin, og trupulleikar eru eisini at fáa bilarnar umbygdar. Harumframt eru útreiðslur til umbygging í heiminum lægri enn væntað.

Framrokning vísir, at játtanin til undirkontu 07. Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi kann lække við 2,2 mió. kr. Tað eru áleið 10-15 færri fólk, sum hava fingið útgjald um mánaðin higartil í 2025 í mun til sama tíðarskeið í 2024. Høvuðsorsøkin, er at fleiri fólk eru sett í eitt átak í arbeiðsbúgving.

Neyðugt verður at hækka játtanina til undirkontu 08. Móttøkuskylda og tryggjaðir búfelagsskapir við 300 tús. kr., orsakað av, at stovnspláss og stuðulstímar eru vorðnir dýrari.

Mett verður, at játtanin til undirkontu 10. Serligur stuðul eigur at hækka við 350 tús. kr.

Framrokningar vísa, at játtanin til undirkontu 11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku eigur at hækka við 2.600 tús. kr., tí at fleiri søkja um at fáa endurgjald fyri inntøkumiss enn lagt varð upp fyri í fíggjarlógini. Talan er bæði um endurgjald fyri ansing av børnum í heiminum og endurgjald til teirra sum ansa doyggjandi, teimum sum hava seinheilaskaða.

Harumframt verður mett, at játtanin til undirkontu 12. Endurgjald fyri meirútreiðslur eigur at hækka við 500 tús. kr.

Íalt verður biðið um, at játtanin til høvuðskontuna verður lækkað við 580 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 147.240 | -580 | 146.660 |
| Inntøkur | 424 | - | 424 |
| **01. Fyribils uppihaldsveiting** | | | |
| **Útreiðslur** | **50.182** | **1.500** | **51.682** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 50.182 | 1.500 | 51.682 |
| **Inntøkur** | **424** | **-** | **424** |
| *77. Flyting frá kommunum* | *424* | - | *424* |
| **02. Varandi uppihaldsveiting** | | | |
| **Útreiðslur** | **225** | **270** | **495** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 225 | 270 | 495 |
| **03. Fíggjarligt ískoyti til stakútreiðslur** | | | |
| **Útreiðslur** | **1.974** | **-200** | **1.774** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1.974 | -200 | 1.774 |
| **06. Stuðul til hjálparráð o.a.** | | | |
| **Útreiðslur** | **38.435** | **-3.700** | **34.735** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 38.435 | -3.700 | 34.735 |
| **07. Uppihaldsveiting vegna arbeiðsloysi** | | | |
| **Útreiðslur** | **10.806** | **-2.200** | **8.606** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 10.806 | -2.200 | 8.606 |
| **08. Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir** | | | |
| **Útreiðslur** | **6.730** | **300** | **7.030** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 6.730 | 300 | 7.030 |
| **09. Hoyritól** | | | |
| **Útreiðslur** | **5.000** | **-** | **5.000** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 5.000 | - | 5.000 |
| **10. Serligur stuðul** | | | |
| **Útreiðslur** | **5.387** | **350** | **5.737** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 5.387 | 350 | 5.737 |
| **11. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku** | | | |
| **Útreiðslur** | **21.063** | **2.600** | **23.663** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 21.063 | 2.600 | 23.663 |
| **12. Endurgjald fyri meirútreiðslur** | | | |
| **Útreiðslur** | **7.438** | **500** | **7.938** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 7.438 | 500 | 7.938 |

# 12.21.8. Sosialar pensjónir

## 12.21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin játtan)

Í 2024 varð minni nýtsla á undirkontu 10. Fólkapensjón. Lagt var ikki upp fyri minninýtslu metingini í fíggjarlógini fyri 2025. Hetta ger eisini, at ætlaða miðalnýtslan í 2025 pr. borgara er ov høgt sett í fíggjarlógini. Mett verður, at játtanin kann lækka við 7 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 735.837 | -7.000 | 728.837 |
| Inntøkur | - | - | 0 |
| **10. Fólkapensjón** | | | |
| **Útreiðslur** | **553.871** | **-7.000** | **546.871** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 553.871 | -7.000 | 546.871 |
| **15. Pensjónsnýskipanin** | | | |
| **Útreiðslur** | **181.966** | **-** | **181.966** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 181.966 | - | 181.966 |

## 12.21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin játtan)

Frágongdin í lægstu fyritíðarpensjón heldur fram. Frá januar til juni 2024 vóru í miðal 167 fólk, sum fingu lægstu fyritíðarpensjón. Fyri sama tíðarskeið í ár er talið 160 fólk í miðal. Mett verður, at játtanin kann lækka við 1,5 mió. kr.

Framrokning vísir, at neyðugt verður at hækka játtanina til avlamisveiting við 300 tús. kr., hetta orsakað av, at talið av fólki, sum fáa hesa veiting er hægri enn lagt er upp fyri í fíggjarlógini.

Fleiri fáa framskundaða pensjón, enn lagt var upp fyri í fíggjarlógini, og tí verður neyðugt at framskriva játtanina við 900 tús. kr.

Samanlagt verður biðið um, at játtanin til høvuðskontuna verður lækkað við 300 tús. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 350.469 | -300 | 350.169 |
| **01. Hægsta fyritíðarpensjón** | | | |
| **Útreiðslur** | **291.246** | **-** | **291.246** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 291.246 | - | 291.246 |
| **02. Miðal fyritíðarpensjón** | | | |
| **Útreiðslur** | **29.201** | **-** | **29.201** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 29.201 | - | 29.201 |
| **03. Lægsta fyritíðarpensjón** | | | |
| **Útreiðslur** | **21.779** | **-1.500** | **20.279** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 21.779 | -1.500 | 20.279 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **04. Avlamisveiting** | | | |
| **Útreiðslur** | **4.065** | **300** | **4.365** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 4.065 | 300 | 4.365 |
| **05. Læknaváttanir** | | | |
| **Útreiðslur** | **1.189** | **-** | **1.189** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 1.189 | - | 1.189 |
| **06. Framskundað pensjón** | | | |
| **Útreiðslur** | **2.989** | **900** | **3.889** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 2.989 | 900 | 3.889 |

## 12.21.8.13. Viðbót til ávísar pensjónistar (Lógarbundin játtan)

Framskrivingar vísa, at neyðugt verður at hækka játtanina við 500 tús. kr. Serliga nógvar eftirrokningar hava verið, orsakað av broytingum í lógini.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 33.271 | 500 | 33.771 |
| **01. Viðbót** | | | |
| **Útreiðslur** | **33.271** | **500** | **33.771** |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 33.271 | 500 | 33.771 |

# § 14 Lógarmál

## Lógarmál

### 14.14.1. Ymsar útreiðslur

#### 14.14.1.10. Útlendingastovan (Rakstrarjáttan)

Útlendingastovan skal kunna avgreiða mál um arbeiðs- og uppihaldsloyvi innan rímiliga tíð. Málsviðgerðin hjá Útlendingastovuni av arbeiðs- og uppihaldsloyvum tekur longri tíð enn ynskiligt, serliga tá talan er um leingjan av arbeiðs- og uppihaldsloyvum. Hetta merkir at serliga arbeiðsgevarar uppliva, at tað tekur nakað longri tíð, at fáa avgreitt mál enn frammanundan, at málsviðgerðin av arbeiðs- og uppihaldsloyvum varð flutt á føroyskar hendur, í fjør heyst.

Ynski er um, at Útlendingastovan megnar at arbeiða nakrar bunkar niður sum skjótast. Í tí sambandi er tørvur á, at fáa sett 3 starvsfólk afturat, so skjótt sum gjørligt. Hetta kann vera annaðhvørt løgfrøðilesandi ella skrivstovufólk. Harafturat er tørvur á einum løgfrøðingi afturat.

Endamálið er at tryggja, at Útlendingastovan fær gjørt neyðug inntriv í teimum málum, sum enn liggja órørd. Ein treyt fyri framhaldandi at tryggja eina nøktandi málsviðgerðartíð í 2026 er, at Útlendingastovan verður uppraðfest samsvarandi í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

Mettur kostnaður fyri 2 starvsfólk, sum verða sett í heyst í ár, er 350 tús. kr. Fyri fult ár, er mettur kostnaður 1,4 mió. kr. í 2026.

**KT-økið**
Viðvíkjandi KT er ætlanin at gera málsviðgerðarskipanina, sum KT-deildin á Vinnustovninum hevur ment, lidna. Útlendingastovan er partur av Vinnustovninum. Harundir er ætlanin at nýta eksterna serkøna hjálp til at gera status og eftirmeting, og at kravfesta víðari menning. Harafturat fáa kravfest eina innlatingarskipan, og lýst grundarlagið fyri eini skipan, at krevja inn gjald fyri avgreiðslur.

Tørvurin framyvir er veldst um, í hvønn mun valt verður at fara víðari við omanfyrinevndu verkætlanum. Men endamálið við nevndu verkætlanum er, at rationalisera og automatisera arbeiðsgongdir, og harvið minka um starvsfólkanýtsluna og effektivisera málsviðgerðina.

Um arbeiðið við víðarimenning av málsviðgerarskipanini skal halda fram, samstundis sum vanligt viðlíkahald verður framt, er tørvur á 300 tús. kr. til endamálið í 2025.

**Hølisleiga**
Útlendingastovan hevur higartil, árini 2022-2024 í meðal goldið 400 tús. kr. í húsaleigu. 1. januar 2025 flutti Útlendingastovan í størri hølir. Samlaður kostnaður fyri húsaleigu í 2025 verður mett til 600 tús. kr.

Tørvur er á 200 tús. kr. í eyka, til endamálið, í 2025. Tørvur er somuleiðis á, at fáa framskrivað húsaleiguna við 200 tús. kr. fyri 2026.

Samanumtikið verður biðið um, at fáa játtanina hækkaða við 0,85 mió. kr. í 2025.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 10.138 | 850 | 10.988 |
| Útreiðslur | 11.657 | 850 | 12.507 |
| Inntøkur | 1.519 | - | 1.519 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 10.138 | 850 | 10.988 |
| **Útreiðslur** | **10.538** | **850** | **11.388** |
| 11. Lønir v.m. | 8.437 | 350 | 8.787 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.676 | 300 | 1.976 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 250 | - | 250 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 150 | 200 | 350 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 25 | - | 25 |
| **Inntøkur** | **400** | **-** | **400** |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *400* | - | *400* |
| **21. Útlegg fyri tænastur til flóttafólk** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **1.119** | **-** | **1.119** |
| 11. Lønir v.m. | 396 | - | 396 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 353 | - | 353 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 139 | - | 139 |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 231 | - | 231 |
| **Inntøkur** | **1.119** | **-** | **1.119** |
| *65. Flytingarinntøkur úr útlandinum* | *1.119* | - | *1.119* |

# § 52 Serinntøkur, løgmansfyrisitingin

## Fíggjarmál o.a.

## 52.15.5. Útlán

### 52.15.5.04. Yvirtøka av Íleggingargrunninum (Stuðulsjáttan)

Íleggingargrunnurin er nú á føroyskum hondum. Í ríkislóg nr. 1461 frá 10. desember 2024 er ásett, at "fonden overdrages til de færøske myndigheder". Lógin fekk gildi 1. januar 2025.

Íleggingargrunnurin varð stovnaður við ríkislóg nr. 28 frá 29. januar 1964 om en investeringsfond for Færøerne. Stovnsfæið fekst til vega við statsstuðli uppá 60 mió. kr. árini 1964-1969, tískil ofta nevndur 60-milliónagrunnurin. Árini 1970-1979 vórðu latnar aðrar 80 mió. kr. í statsstuðli.

Endamálið hjá grunninum er fyrst og fremst at veita lán til størri almennar íløgur, ið verða hildnar at vera neyðugar til menning av vinnulívinum, og har nóg mikið av fígging ikki kann verða útvegað á annan hátt. Eisini kann grunnurin veita lán til vinnurekandi og vinnufelagsskapir, sum verða hildin at virka til frama fyri vinnulívinum sum heild, í tann mun fígging ikki fæst frá øðrum.

Í 2007 og 2013 er eginognin lækkað við ávikavist 365 mió. kr. og 28 mió. kr. til at fíggja útbyggingina av Vága floghavn. Í sambandi við bankakreppuna í 90'unum avskrivaði grunnurin lánið uppá 200 mió. kr. til Fíggingargrunnin.

Íleggingargrunnurin er sjálvstøðugur grunnur við einum stýri. Sambært ársfrásøgnini fyri 2024 var eginognin hjá grunninum 715,5 mió. kr. Eginognin verður tikin við sum inntøka og sum útreiðsla at verða latin í grunnin. Virksemið hjá grunninum verður ikki tikið við í fíggjarlógina, men verður roknskapurin hjá grunninum tikin við sum hjáskjal í landsroknskapinum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | - | 715.500 | 715.500 |
| Inntøkur | - | 715.500 | 715.500 |
| **01. Yvirtøka av Íleggingargrunninum** | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **715.500** | **715.500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | - | 715.500 | 715.500 |
| **Inntøkur** | **-** | **715.500** | **715.500** |
| *65. Flytingarinntøkur úr útlandinum* | *-* | *715.500* | *715.500* |